gult20 cyan20 magenta20 svart20



# 12 gulldreingir - 12 gulldreingir -12 gulldreingir -12 gulld

*Tað kann kanska tykjast órættvíst, bert at taka teir 12 leikararnar, sum eru nevndir á hesum síðum. Liðið hjá VÍF hevur í ár hava sína avgjørd*
*og hetta hevur viðført, at tað sjáldan hava verið stundir at taka sær av løttum. Hesir 12 eru so teir, sum stóðu á dómaraseðlinum til seinasta*



**Eli Müller, 1 mál**

Saman við kappingarneytanum um fremsta málverjaplássið hjá VÍF hevur Eli verið ein sera týðandi lutur av VÍF liðnum. Hevur sína avgjørdu styrki í evnunum at lesa mótstøðumenninar av, soleiðis at um hesir eru ov einstáttaðir í skotunum, verða teir at kalla beinan vegin stongdir úr dystinum. Hevur hartil eisini frágera góð evni at seta mótálop í gongd.



**Sámal Joensen, 124 mál**

Stóri bakkurin hevur aftur í ár verið vestmenningum ein sera hollur stuðul. Við dundurskotum sínum er hann altíð góður fyri nøkur mál, og undir øllum umstøðum skapar hóttan hansara nógv pláss til viðleikararnar. Varð í fjør kosin ársins verjuleikari, og hetta sigur eisini sera nógv um tann leiklut, sum hann hevur í stóru og sterkur VÍF-verjuni.



**Áki Olsen, 124 mál**

Kanska besti føroyski álopsleikarin var í ár aftur at síggja í barndómsfelagnum, og hann átti so avgjørt eisini sín lut í gullmerkjunum. Fyrst og fremst er og verður tað óhugnaliga skotstyrki hansara, sum ger hann til ein virðismiklan leikara, men hann hevur so avgjørt eisini onnur evni á einum hondbóltsvølli. Hevur eitt nú í fleiri dystum við góðum úrsliti loyst eldra bróðurin av á miðplássinum.



**Bárður Nielsen, 1 mál**

Saman við Eli telist Bárður so avgjørt millum bestu málverjarnir í landinum, og landsliðsúttøkan ber eisini boð um, at so er. Í mun til Eli er Bárður nakað fimari í málinum, eins og hann kropsliga er nakað størri enn kappingarneytin. Munurin teirra millum ger tó, at hvør í sínum lagi standi seg betri móti ávísum liðum, og hetta hevur so avgjørt verið ein av stóru styrkjunum hjá Vestmenningum.



**Ingi Olsen, 155 mál**

Ársins leikari í fjør er so avgjørt ein av heitu biðlunum til sama heiti aftur í ár. Týdningur hansara fyri liðið kann neyvan undirmetast, og er tað bæði í leiklutinum sum spælskipari og málskjútti at hann ger um seg. Er hartil eisini sera stinnur í verjuspælinum, har hann við kvikleikanum fær fatur á nógvum bóltum. Størsta styrki hansara er tó helst sálarlig, tí aloftast tykist tað soleiðis, at spæl hansara bara gerst betri, størri týdningurin av dystinum er.



**Petur Frank Joensen, 12 mál**

12 mál tykist ikki nógv fyri ein strikuspælara, sum aloftast verður nýttur í álopspartinum, men málskjótingin er heldur ikki týdningarmesta uppgávan hjá Petur Frank. Er hinvegin sera stinnur, tá pláss skal skapast fyri viðleikarum, tí hóast hann ofta tykist lítil, so megnar hann væl at nýta kroppin, og á tann hátt forða mótstøðumonnunum í at sleppa út eftir bakspælarunum.

gult21 cyan21 magenta21 svart21



VÍF–StÍF 38–27 (22–13)

# Endaðu við málveitslu

**Vestmenningar lótu ongan iva vera um, at teir í løtuni eru besta liðið í landinum, tá teir leygardagin leiktu seinasta dystin á árinum**

HONDBÓLTUR
*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk*

Hóast tað fyri langari tí síðani var avgjørt, at gullmerkini fyri hetta kappingarárið skuldu fara til Vestmanna, so var tó nakað av spenningi undan seinasts dystinum móti StÍF.

Strandingarnir eru nevnliga teir einastu, sum í ár hava megna at sett vestmenningum forðingar fyri. Ikki bara tóku teir øll á bóli, tá teir vunnu steypafinaluna, men eisini hava teir syrgt fyri, at menninir úr Vestmanna ikki sluppu at enda kappingarárið við fullum stigatali.

## Skjót avgerð

Tískil høvdu vestmenningar nakað at hevna leygardagin, og tað tóktist eisini skjótt greitt, at teir veruliga ætlaðu sær at hevna seg inn á strandingarnar.

VÍF var snøgt sagt nógv grammari enn mótstøðuliðið, og tað gekk ikki long tíð, fyrr enn tað fór at dragna millum liðini, og eftir at VÍF hevði skotið fimm mál á rað, tóktist alt í roynd og veru at vera avgjørt.

Strandingar toktust hinvegin als ikki at vilja tað sama við dystinum sum vertirnir. Álopsspælið kom ongantíð uipp á tær hæddirnar, sum teir áður hava sýnt, at teir eru førir fyri, og í verjuni var nærlagni als ikki hitt sama, sum tað vanliga hevur verið. Tað var sostatt meira enn eina ferð, at Jóhan sást rópa eftir viðleikarunum, tí hesir ikki vóru nóg ansnir í verjuni, og tað skal eisini verða sagt, at málverjin hevði alla orsøk til at vera ónøgdur.

## VÍF sýndu klassa

Fyri at venda aftur til vestmenningarnar, so sýndu teir í longum løtum av hálvleikinum, hví teir í ár hava verið nærum einaráðandi í bestu mansdeidlini.

Til tíðir gekk álopsspælið sera skjótt frameftir. Ikki minst tóktist Johnny Joensen at vera sera væl upplagdur, og tað tóktist líkamikið, um hann við fullari ferð fór einsamallur móti málinum, ella um hann tveitti seg inn frá strikuni. Úrslitið var hitt sama hvørja ferð, og munurin øktist støðugt.

Tá komið varð í helvt, vóru longu níggju mál á muni, í seinna hálvleiki tóktist tað ongan tíð vera soleiðis, at StÍF á nakran hátt skuldi fara at minka um munin. Heldur tóktist tað í løtum, sum um vestmenningar høvdu ætlanir um at økja enn meira, men gestirnir sluppu bíliga, tí VÍF seinasta hálva tíman hugsaði meira um undirhaldið enn um munin á máltalvuni.

## Ikki tómhentir

Tá alt kom til alt, so hevði VÍF sostatt prógvað, at teir í løtuni eru so nógv tað besta liðið í landinum. Í hesum dystinum tóktust teir at hava tamarhald á snøgt sagt øllum plássum.

Hetta hevur eisini verið søgan megin partin av árinum, og so mugu vestmenningar bara læra at liva við, at tað ikki eydnaðist teimum at vinna greipuna hetta kappingarárið. Fólkið høvdu teir til tað, men ta ferðina var dagurin bara ikki teirra, og ivaleyst eru strandingarnar eisini nøgdir um eitt gull- og eitt silvurmerki.

Tað var eisini júst hettta, sum formaðurin í HSF, Petur Ovi Petersen, legði dent á, tá hann eftir dystin hevði til uppgávu at handa steyp og heiðursmerki. Hann segði uttan stórvegis iva í røddini, at hetta árið hevði VÍF so avgjørt verið tað besta liðið, men legði í sama viðfangi afturat, at strandingar so avgjørt ikki fóru tómhentir heim eftir hálvt ár á ymsu hallargólvunum.



*So kundi VÍF endiliga lata sjampanjupropparnar flúgva. Teir eru føroyameistar, og hetta hava teir tryggjað í stórum stíli*



*Eftir dystin var tað sjálvsagt, at Hjalmar Klein Olsen skuldi hava traditionella lufttúrin*

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ingi Olsen 9(3), Johnny Joensen 9, Áki Olsen 8, Marti Hummelsen 4, Agnar Joensen 3, Sámal Joensen 2, John Zachariasen 2, Rógvi Nielsen 1
StÍF: Costin Dumitrescu 8(5), Artur Johansen 7, Kristian Petursson 4, Marius Joensen 3, Leivur Justinussen 3, Sveinbjørn Poulsen 2
Brotskøst: VÍF 4, VÍF 5
Útvísingar: VÍF 2, StÍF 2
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen.



*Í fjør kiksaði tað á seinasta degi, men í ár kundi Ingi Olsen so endiliga taka ímóti steypinum*